**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

Vegna forlongt barnsburðarfarloyvi verður til **B7** søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi í tíðarskeiðinum 1. mars 2003 til og við 31. juli 2003. Avloysarastarvið er heiltíðarstarv í skiftandi vaktum.

Deildin hevur 15 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lunga-gikta- og ryggjasjúkum v.m.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu Mortensen, deildarleiðara á **B7**, telefon 31 35 40, lokal 107 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 300, e-post asap@ahs.fo.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 3. februar 2003 kl. 12.00.



# Et kursus for begyndere i islandsk og islandsk kultur

Tid:
30. juni–12. juli 2003

Program:
4 timers sprogundervisning hver morgen
Forelæsninger om islandsk samfund, litteratur, sprog, historie, madkultur og musik samt studierejser til islandske sagasteder.
Undervisningen foregår på nordiske sprog.

Deltagere:
Kurset er beregnet til nordboere.

Kursusafgift:
3500 DKR.
Kursisterne betaler selv for rejse og ophold.
Nordens hus kan arrangere overnatning for kursister.

Anmeldelse:
Ansøgningsblanketter til kurset findes hos Nordens hus i Reykjavik eller på Nordens hus hjemmeside www.nordice.is

For nærmere oplysninger venligst kontakt sprogkonsulent **Kristín Jóhannesdóttir,**
tel. +354 551 70 30, fax +354 552 6476,
e-post: sprog@nordice.is

# Sethús til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt lýsa vit ognina Áargeil 13 B, Tórshavn, til sølu.

Húsini eru bygd uml. 1980. Húsini, sum eru onnur helvtin av einum dupulthúsum, standa í Áargeil 13, Tórshavn, og hava kjallara, miðhædd og loft.

Húsini eru eini timburhús í trimum hæddum, hvør hæddin 56 m². Takið er úr aluminium. Húsini verða upphitað við miðstøðuhita.

Grundøkið er til víddar 283 m².

Sethúsini standa centralt fyri og hava gott útsýni yvir Havnina, serliga av loftinum, og standa út til Vestara Ringveg.



Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum inn komin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Christian Andreasen, advokat.

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9**
**100 Tórshavn · Tlf. 311145**
Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

# Gáski-bátar

**Víkingur 800, 2–3 ár**



5 DGN snellur, línuspæl, línurennu og ymiskt annað.
Prísur kr. 799.000,-
Báturin er sum nýggjur og 100% klárur til útróður.
Kann leverast beinanvegin.

Nakrir brúktir Gáski-bátar eru eisini til sølu.
Prísir úr 365.000,- kr.

Við í øllum prísum er ein ferðaseðil til Íslands at hyggja at/royna bátarnar.

**Tlf. 003548999296** (tosar føroyskt)
eftir kl. 18.00
**Tlf. 227830**
Leygardag og sunnudag **tlf. 227830** ella
**003548999296**

# Snikkari/timburmaður

Vit søkja eftir snikkara/timburmanni at byrja skjótast tilber

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Arbeiði umfatar í høvuðsheitum:**
- seruppgávur sum td. sprossavindeygu, skeiv vindeygu, ymisk snið av vindeygum og altanhurðum

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágritin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

**Løn:**
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fróða Hansen, tel. 22 36 56 ella Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Feløgini hava felags skrivstovuviðgreiðslu. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr timbur og plast. Í løtuni eru vit 25 starvsfólk, harav 8-10 eru í timburframleiðsluni.*

# FARTELEFONIR & BREITT ÚRVAL AV TILHOYRI

MOTOROLA SIEMENS



ERICSSON NOKIA

**Storno** Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045



# Pedagogar

Søkt verður eftir:
2 pedagogum, 30 t. um vikuna, frá 1. mars 2003 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er ein kommunalur stovnur hjá Runavíkar kommunu, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar, 4 hjálparfólk.

Endamál stovnsins er við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum, í tryggum og stimbrandi umhvørvi og í góðum samstarvi og samskifti millum foreldur og starvsfólks sínámillum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu ella Conny á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2003.

**Kongshavnar Barnagarður og Vøggustova**
Heiðavegur
Postboks 119
FO-600 Saltangará

INPACT INTERNATIONAL

# Grannskoðari

P/F Grannskoðaravirkið INPACT, sum er elsta grannskoðaravirkið í landinum, søkir eftir grannskoðara at byrja 1. mars.

Viðkomandi skal hava HH ella líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava royndir á økinum, men ikki ein treyt.

Arbeiðið hjá einum grannskoðara er sera fjølháttað, og fevnir eitt nú um hesi øki:

- Bókhaldshjálp, so sum avstemningar, uppgerðir v.m.
- Grannskoðan
- Roknskaparuppseting
- Skatt
- Ráðgeving innan roknskap, skatt, fígging v.m.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Grannskoðaravirkið INPACT**

stílaður Jógvani Amonsson, í seinasta lagi 28. januar 2003.

**Mentamálaráðið**
*Mentamáladeildin*

### Stuðul til mentanarlig tiltøk

Á fíggjarløgtingslógini er peningur settur av til stuðul til ymisk mentanarlig og listarlig tiltøk, mentanarligar verkætlanir og tiltøk innan- sum uttanlands.

Játtanin er ætlað at birta upp undir og stuðla einum virknum og mennandi mentanarlívi á bygd og í býi, at flyta fram og gera føroyska mentan og list sjónligari innan- og uttanlands, og at geva stuðul til føroyskar verkætlanir, ið lutvíst verða fíggjaðar við stuðli frá Norðurlendska Ráðharrastovninum, Norðurlendska Mentanargrunninum ella stovnum og nevndum undir Norðurlendska Ráðharrastovninum. Stuðul kann eisini veitast einstaklingum til nýskapandi listarlig ella mentanarlig tiltøk, verkætlanarfyrireiking og annað listarligt virksemi.
Áhugað eru vælkomin at søkja.

**Freistin at søkja er leygardagin 15. mars 2003.**

### Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálaráðið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpenninginum, verður at nýta til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

**Freistin at søkja er týsdagin 15. apríl 2003**

### Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari

Umsóknir skulu stílast:
Mentanargrunni Landsins
Tórgarðsgøta 42
100 Tórshavn

### Stuðul til myndlistafólk

Peningur er settur av á fíggjarløgtingslógini 2003 til stuðul fyri myndlistafólk. Listafólk sum eru undir útbúgving kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir.

**Freistin at søkja er leygardagin 15. mars 2003**

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: *www.mmr.fo*, ella fáast við at venda sær til:

**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55**
**e-postur.: ummr@mmr.fo**

Tey, ið ysnkja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálaráðið á telefon 35 50 50.

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal m.a. verða innrættað soleiðis, at børnini hava rúm at spæla í, og at trygt er at spæla uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jónu E. Jacobsen á tlf. 42 16 60.

**Kvívíkar kommuna**
FO-340 Kvívík
Tlf. 42 12 94

# Írestandi skattur 2002 og AM-gjald 2002

Freistin til at gjalda írestandi skatt og írestandi AM-gjald fyri skattaárið 2002 er 31. januar. Um goldið verður í seinasta lagi hendan dagin, slepst undan eykagjaldinum upp á 6%.

Útrokningarforrit er at finna á heimasíðu stovnsins www.tollskatt.fo

Eisini ber til at rokna írestandi skattin út í bóklinginum »Skatturin 2002«, ið verður borin út til øll húski í hesum døgum.

Tá skatturin verður goldin, skal viðmerkjast: p-tal og »Skattur 2002«.

Argir, 14. januar 2003

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

<ph_1> <ph_1> <ph_1> <ph_1>